## USA annan leiðsluhátt

Senatorurin John Edwards, sum roynir at gerast forsetavalevni hjá demokratunum í USA næsta ár, sigur nú, at eitt av hansara málum sum forseti verður at avmarka ávirkanina hjá teimum stóru fyritøkunum. Herumframt ætlar hann søær at fremja fleiri broytingar í sjálvum leiðsluháttinum í Washington, sum hann tekur til. John Edwards var í statinum New Hampshire í gjár, og haðani skal hann til Iowa at halda veljarafundir, og eygleiðarar siga, at her fer hann at fáa hvassorðaðar atfinningar frá Hillary Clinton og Barrack Obama, ið eisini royna at gerast forsetavalevni hjá demokratunum.



# Gera klárt at flyta til Suðuroyar

**Á Strandferðsluni eru tey farin at pakka, tí nú skal stovnurin flytast til Suðuroyar. Tann 14. januar letur Strandferðslan upp á Tvøroyri**

ALMENNUR STOVNUR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Á Strandferðsluni eru tey nú farin at pakka tí stovnurin skal flyta til Suðuroyar og stjórin Jákup Danielsen, hevur longu fingið sumt av útgerðini í pappeskjur*

Á Strandferðsluni í Havn er rokan í fjørðuni í hesum døgum, tí har er støðan av álvara farin at mekjast av, at tann stóri flytidagurin er farin at nærkast.

Har eru tey nevniliga farin at pakka, tí nú skal Strandferðslan flytast til Suðoyar.

Fyrr í ár gjørdi Jacob Vestergaard, landsstýrismaður av at flyta Strandferðsluna til Suðuroyar á nýggjárinum.

Hetta verður eisini so – næstan.

Jákup Danielsen, stjóri á Strandferðsluni, sigur, at avgerð er tikin um, at mánadagin 7. januar verður skrivstovan í Havn endaliga afturlatin.

Og eina viku seinni, mánadagin tann 14. januar, letur Strandferðslan sostatt upp á Tvøroyri.

Hetta verður ein søguligur dagur, tí hetta er fyrstu ferð, at ein heilur almennur stovnur verður fluttur úr Havnini, út á bygd.

Áður er Skipaeftirlitið flutt úr Havn vestur í Vágar, men tá var á ein hátt talan um ein nýggjan stovn, tí tað hendi í sambandi við, at tað varð yvirtikið frá dønum.

Men at Strandferðslan nú flytir til Suðuroyar er fyrstu ferð, at ein almennur stovnur verður fluttur úr Havnini og at ein almennur myndugleiki sostatt verður miðfirraður.

### Eina viku at flyta í

Jákup Danielsen sigur, at flytikassar eru komnir og hesar næstu dagarnar skulu teir pakkast.

Ætlanin er at flyta alla útgerðina suður við Smyrli mánamorgunin 7. januar og so verður beinanvegin farið undir at rigga skrivstovuna á Tvøroyri til.

- Sostatt lata vit upp aftur á Tvøroyri mánamorgunin tann 14. januar.

Hann sigur, at tað slepst sostatt ikki undan, at virksemið hjá stovninum fer at vera órógvað til flytingin er fingin í rættlag, serliga í vikuni frá 7. til 14. januar.

Men telefonin verður tikin í sum vant og rutuupplýsingin fer somuleiðis at virka sum vant.

Hann sigur, at annars skuldi alt verið klárt at flyta suður. Í Havn eru tey til reiðar og hølini á Tvøroyri eru við at vera klár, so tað verður onki spøri í tí, sigur hann.

Samstundis er greitt, at hvat starvsfólki viðvíkur, verður tað ein spildurnýggjur stovnur, sum flytir til Suðuroyar, tí síðani avgerð varð tikin um at flyta stovnin til Suðuroyar, er øll tey gomlu starvsfólkini eru farin úr starvi.

Men hinvegin ivast stjórin onga løtu í, at tað fer at gangast Strandferðsluni væl í Suðuroy, tí talan er ikki um ein so fløktan stovn, at tað ikki ber til at reka hann á bygd og hølini á Tvøroyri eru góð at flyta inn í og tey liggja væl fyri.

# Ongantíð sæð so svart út

**Sum støðan er nú, dugir formaðurin í Reiðarafelagnm ikki at síggja eina loysn á verkfallinum hjá Fiskimannafelagnum. Hann ivast í um partarnir nakrantíð hava staðið so langt frá hvørjum øðrum fyrr**

VERKFALL
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*- Vit hava altso ikki meiri enn 100% at býta ímillum skip og manning og krevur annar parturin meiri av kakuni, verður sjálvsagt minni til hin partin og vit eru longu komin hartil, at hjá summum skipum loysir tað seg líka frægt at liggja við bryggju sum at fiska*

- Tað hevur neyvan nakrantíð áður sæð so svart út.

Viberg Sørensen, formaður í Reiðarafelagnum, dugir ikki í løtuni at síggja nakra sum helst loysn á trætuni við Fiskimannafelagið, sum hevur ført til, at allir fiskimenn eru farnir í verkfall.

Hann hevur verið limur í nevndini í Reiðarafelagnumi næstan 20 ár og hevur sostatt eisini verið við til nógvar samráðingar.

Men hann sigur, at partarnir hava ongantíð verið so langt frá hvørjum øðrum, sum teir standa nú.

Tí heldur hann eisini, at tað er heilt ómøguligt at siga nakað um, nær verkfallið kann hugsast at fáa ein enda.

### Olja og eftirløn

Tað sum serliga skilir partarnar, er spurningurin um eftirløn til fiskimenn og útreiðslurnar til oljuna.

- Partarnir hava undirskrivað eina váttan um, at fer oljan upp um 2,90 krónur fyri liturin, skulu partarnir tosa um, at fiskimenn betala ein part av oljuni.

Nú kostar oljan umleið fýra krónur fyri liturin og nú eru vit komin hartil, at tað loysir seg betri hjá summum bátum at liggja, heldur enn at fiska, tí teir fiska ikki fyri olju.

Hetta er serliga galdandi fyri teir stóru lemmatrolararnar.

- Teir hava tað nú so svárt, tí oljan er so dýr, at fiskaprísurin vigar ikki upp ímóti tí.

- Oljan er ein veruleiki og tað nyttar ikki hjá øðrum partinum at skúgva tann veruleikan til viks og tvíhalda um, at hetta er ein útreiðsla, tey ikki vilja vita av.

- Vit hava ikki meiri enn 100% at býta sundur ímillum manning og skip og tí er tað eyðsæð, at skal annar parturin hava størri part av einum 100 prosentunum, slepst ikki undan, at minni verður eftir til hin partin, tí kakan veksur ikki.

- Sostatt nyttar heldur ikki hjá Fiskimannafelagnum at krevja alsamt størri part av kakuni, tí skiparaksturin er nú so tungur, at vit eru longu komin hartil, at tað loysir seg ikki hjá summum skipum at fiska.

### Mugu fáa fyri at geva

Sum støðan er nú, fer oljan av óbýttum hjá flakatrolarunum og línuskipunum. Har er støðan sostatt tann, at gongdin í oljuprísinum ávirkar báðar partar.

Men hjá feskfiskatrolarunum og øðrum skipabólkum, fer manningin fyrst sín part og so fer oljan av partinum, sum skipið hevur eftir og tann útreiðslan er nú so tyngjandi, at tað loysir seg ikki hjá summum skipabólkum at loysa.

Samstundis hava fiskimenn trákkast eftir at fáa eina betri eftirløn og Viberg Sørensen staðfestir, at tað taka reiðararnir fult undir við.

- Men tað gongur ikki at skipini bæði skulu betala alla oljuna og eftirløn til fiskimenn. So hongur roknistykkið slett ikki saman.

- Skulu vit betala meiri í eftirløn, mugu vit fáa okkurt inn í hinum endanum, staðfestir hann.

Viberg sigur, at tískil hevur eitt uppskot til Fiskimannafelagið verið, at oljan fer av óbýttum og at fiskimenn afturfyri fáa eina betri eftirlønarskipan.